# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Rennikapping niðan á Sornfelli



*Árliga renningin niðan á Sornfelli, sum Mjørkadals Ítróttarfelag skipar fyri, verður á skránni leygardagin. Rennararnir skulu renna frá Statoil-støðini í Kollfjarðardali og niðan á Sornfelli.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Mjørkadals Ítróttarfelag skipar um vikuskiftið fyri fimtu MIF Top Run renningini, har luttakararnir skulu renna niðan á Sornfelli**

**RENNING**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.of*

Fimta árið á rað hevur Mjørkadals Ítróttarfelag gjørt av at skipa fyri rennikapping niðan á Sornfelli. Teinurin, sum rennast skal, er 9,8 kilometrar til longdar, og rennararnir leggja út niðri við Statoilstøðini í Kollfjarðardali, og so verður runnið allan vegin niðan á Sornfelli.

Rennararnir byrja í á leið 70 metra hædd, og tá teir koma á mál, eru teir heilt uppi á knøppum 700 metrum, so hetta er ein rættiliga strævin túrur í harðari mótbrekku.

Renningin er annars býtt upp í fýra bólkar – tveir hjá monnum og tveir hjá kvinnum. Hjá kvinnum er tað soleiðis, at kvinnur yvir 40 ár eru í einum bólki, meðan kvinnur undir 40 ár eru í hinum bólkinum. Og júst tað sama er eisini galdandi hjá monnum. Leggjast kann afturat, at trý tey fremstu í hvørjum bólki fáa heiðursmerki, meðan allir luttakararnir fáa diplom.

Sum sagt, so er hetta ein rættiliga strævin teinur, og tann maðurin, sum hevur runnið teinin skjótast, er Sigurd Justinussen, sum kom á mál í tíðini 45 min. 02 sek. í 2005. Bjørk Herup Olsen hevur runnið teinin skjótast av kvinnunum. Hetta var í fjør, tá hon kom á mál við tíðini 54 min. 33 sek. Fyrireikararnir siga annars, at túrurin kann taka úti við hálvanannan tíma.

Tey, sum hava hug at taka lut í kappingini, kunnu melda seg til á www.renn.fo. Tað er tó eisini møguleiki fyri at eftirtilmelda seg undan kappingarbyrjan leygardagin. Henda tilmelding fer fram, har kappingin byrjar millum kl. 13.30 og 14.45. Kappingin byrjar kl. 15.00.

Fyriskipararnir siga eisini, at øll eru vælkomin til kappingina.

# Fleiri føroysk met í Belgia



*Apolonia Justesen (myndin) og Ragnvaldur Jensen hava sett fimm føroysk met í HM-kappingini í Belgia.*

**Tað gongur avbera væl hjá føroysku ÍSB-svimjarunum, sum í hesum døgum luttaka í HM í Belgia. Eftir fyrstu tríggjar dagarnar hava tey bæði sett fimm føroysk met**

**SVIMJING**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni var frammi her í blaðnum, at teir báðir føroysku ÍSB-svimjararnir, sum í hesum døgum taka lut í HM-kappingini í belgiska býnum Gent, fingu sera góð úrslit á fyrsta degnum, har Ragnvaldur Jensen m.a. setti tvey nýggj føroyskt met.

Nú eru tveir kappingardagar farnir fram við síðani góða fyrsta dagin í kappingini, og úrslitini eru enn góð hjá Ragnvaldi Jensen og Apoloniu Justesen. Mikudagin skuldi Apolonia svimja tvær kappingar, nevniliga 50 m firvald og 200 m blandað svimjing, og her gekk væl. Í 50 m firvald kom hon á mál í tíðini 44.62 sekund, og var hetta nýtt føroyskt met.

Løtu seinni kappaðist hon í 200 m blandað svimjing, og við tíðini 3:58.47 svam hon sína næstbestu tíð nakrantíð.

Ragnvaldur skuldi eisini í hylin tvær ferðir henda dagin. Fyrst svam hann 100 m frí og kom á mál við tíðini 1:06.97, og løtu seinni skuldi hann svimja 200 m bringu. Her kom hann á mál í tíðini 3:13.27, men hvørgin av hesum tíðunum rakk til føroyskt met.

Sjálvt um tíðirnar mikudagin vóru góðar, so rakk eingin av teimum báðum føroyingunum eitt pláss í finaluni.

Hósdagin skuldi tey bæði svimja í einari kapping hvør, og í báðum førunum megnaðu tey at seta føroyskt met.

Apolonia Justesen luttók í kappingini 400 m frí, og hon setti nýtt føroyskt met við tíðini 6:32.19. Løtu seinni setti Ragnvaldur eisini føroyskt met á 50 m frí teininum við tíðini 28.51 sekund, men heldur ikki hesa ferð megnaði nakar teirra at koma í finaluna.

Í dag skulu tey bæði aftur taka lut í einari kapping hvør, og sagt verður úr Belgia, at tey hava góðar vónir aftur í dag. Tey vóna, at svimjararnir fara at koma í finaluna í hesum kappingunum, men hetta verður sjálvandi ikki lætt, tí støðið í kappingini er sera høgt.

Sjálvt um svimjararnir bert eru komnir í eina finalu, so hava úrslitini tó verið sera góð hjá svimjarunum. Í teimum nýggju kappingunum, sum tey bæði hava tikið lut í, er tað blivið til fimm føroyskt met.

# Góðar vónir til Katrin

**Heimsmeistarakappingin í rógving byrjar í München sunnudagin, og her eru føroyska Katrin Olsen og Juliane Elander Rasmussen, sum manna danska lættvekt dupultscullaran, millum stóru favorittarnar**

**RÓGVING**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Stórur partur av danska landsliðnum í rógving hevur síðstu vikurnar verið á venjingarlegu í Eysturríki, har tey hava fyrireikað seg til HM-kappingini, sum byrjar í München sunnudagin.

Ein av rógvarunum á danska landsliðnum er føroyska Katrin Olsen, sum mannar danska lættvekt dupultscullaran saman við Juliane Elander Rasmussen. Kappingin í júst hesum bátaflokkinum hevur verið hørð í millum donsku rógvararnar, og tí hevur landsliðsvenjarin roynt fleiri samansetingar. Samansetingin við Katrin Olsen og Juliane Elander vísti seg at vera tann sterkasta, og í teimum báðum World Cup-kappingunum, sum Katrin og Juliane hava róð saman, er tað blivið til gull í báðum førum.

Nú stendur so HM-kappingin fyri framman, og danir hava sera góðar vónir til tær báðar kvinnurnar umborð á lættvekt dupultscullaranum. Og kvinnurnar sjálvar hava eisini góðar vónir.

- Sjálvt um okkara kappingarneytar eru sterkir, so fara vit eftir at vinna heiðursmerki, og ongantíð betur, um hetta verður av gulli, siga tær báðar.